## DAGSINS MEINING

# Ymisk sjónarmið

Reyði tráðurin í fullveldisargumentatiónini hevur verið og vísir seg tíverri framvegis at vera, at ein objektiv sannheit er til — teirra -, og so fella øll onnur í partapolitiskar skotgrøvir, eru ósaklig ella ikki óheft.

Sjónarmið eru so ymisk, og ilt er at síggja, at persónar, sum illteinkja øllum øðrum fyri at ganga ørindi fyri ávís politisk áhugamál, skulu verða tað besta referansupunktið fyri óheftni. Gamalt er, at tjóvur trýr hvør maður stjelur.

Vit hava í hesari samgonguni verið vitni til eitt sera ódámligt átak, har skattaborgarans peningur varð nýttur til eina politiskt heftari heimasíðu, har orð sum avtalubrot vóru slongd eftir donsku stjórnini. Tá man kemur við sokallaðari óheftari informatión frá landstýrinum, ið ikki strengt heldur seg til tað faktuella og ikki ekskluderar politiskar greinar av ymsum slag, so er man á einum demokratiskum glíðibana. Tá so somu kreftir leypa upp, hvørja onkur fjølmiðil ikki júst syngur úr fullveldissangbókini, sum vit sóu tað, tá SVF hevði samrøðu við ein politikara í samband við eitt mál í uttanlandsnevndini, so átti tað at verið enn størri orsøk at stúrsa við dikteringstrongdini, ið tykist gera seg galdandi.

Tað er ikki meiningsmonopol í Føroyum, og má fullveldisvongurin venja seg við, at hóast teir halda seg hava rætt, so mugu aðrar meiningar respekterast. Tað áhugaverda við fullveldisdebattini er, at nú byrja tey praktisku tingini at koma á borðið, har man áðrenn hevur ligið í ævigum orðklúgvaríið um fólkarætt og annað, og hevur ikki sæð skógin fyri berum trøum.

Persónar eru so ymiskir, og soleiðis eru bløð eisini ymisk. Vit skulu ikki ákæra nakran fyri ikki at vera óheftan. Summi halda, at fíggjarlógin, pensiónsmálið, privatiseringar og standurin í fiskivinnuni eru stórtíðindi, og aðrir meina reint objektivt við sínari journalistisku ekspertisu, at tað er stórtíðindi fyri Føroya land, at eitt lokalfelag hjá Sambandsflokkinum hevur avgjørt ikki at stilla ein einstakling av Strondum upp á sambandslistan í Eysturoynni til næsta løgtingsval.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Neyðugt við framtaki fyri einum fólkaheilsupolitikki

**Hans Pauli Strøm,**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



- **okkum vantar ein samskipandi heilsupolitikk at menna heilsufremjandi og byrgja fyri heilsuskaðiligum viðurskiftum allastaðni í samfelagnum**

Heilsuviðurskiftini í landi okkara eru nógv meira enn bara ein spurningur um, hvussu nógvan pening vit brúka uppá heilsuverkið. Rætt er tíverri, at á fleiri økjum vantar enn nógv í at fáa viðurskiftini í heilsuverkinum upp á eitt nøktandi støði. Hetta er í stóran mun ein spurningur um nøktandi játtanir til rakstur og íløgur. Hinvegin er eisini nógv sum bendir á, at hóast vit brúka støðugt fleiri pengar til heilsuverkið, so gerast ikki heilsuviðurskiftini hjá fólkinum samsvarandi betri bert av tí.

Ein orsøk til hetta er óivað, at ov lítil dentur verður lagdur á tann fyribyrgjandi heilsupolitikkin - at styrkja og bøta um almennu heilsustøðuna hjá fólkinum. Mest sum øll orkan hjá heilsuverkinum fer til at hjálpa, táið heilsan hjá tí einstaka longu hevur fingið skaða, og viðgerð er neyðug.

**Vit hava ongan virkandi fólkaheilsupolitikk...**
Ein fólkaheilsupolitikkur miðar hinvegin eftir at styrkja almennu heilsustøðuna hjá fólkinum, at eggja til heilsugóða lívsførslu, at menna heilsufremjandi viðurskifti og at byrgja fyri sjúkuelvandi og heilsuskaðiligum viðurskiftum, á arbeiðsplássunum, í heima- og frítíðarlívi, allastaðni í samfelagnum.

Men tað er harmiligt at staðfesta, at vit hava ongan orðaðan ella skipaðan fólkaheilsupolitikk í Føroyum.

Tí er alneyðugt at taka stig til hetta sum skjótast. Tað skuldi ikki verið so trupult at farið undir, tí vit hava longu fleiri av fortreytunum, sum skulu til.

**Men vit hava eitt fyribyrgingarráð...**
Í Almanna- og heilsumálastýrinum er sett eitt Fyribyrgingarráð í staðin fyri Tubbaksráðið, AIDS-ráðið og frá 1.1.2002 eisini fyri Rúsdekka- og Narkotikaráðið. Hetta ráðið (av fakfólki) skal, sum tað verður sagt í fíggjarlógini: "skipa virksemið viðvíkjandi fyribyrgjandi arbeiðinum og leggja eina ætlan fyri at bøta um fólkaheilsuna yvirhøvur". Fyribyrgingarráðið kann koma við upplýsingum og góðum ráðum. Men tað arbeiðir uttan nakran yvirorðnaðan fólkaheilsupolitikk. Tá ber illa til at arbeiða nóg miðvíst og munagott.

**Og eina deild fyri arbeiðs- og almannaheilsu...**
Í sjúkrahúsverkinum er nakað sum kallast Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu. Vit hava hoyrt um onkrar granskingarverkætlanir, um kviksilvureitran av grind, og um kanningar av rúsevnismisnýtslu millum skúlanæmingar. Men kortini kann neyvan sigast, at tað finst nakar skipaður almannaheilsupolitikkur. Ella nakar arbeiðsheilsupolitikkur ella arbeiðsmedisin í Føroyum. Gagnligt hevði verið við regluligum kanningum av, hvussu heilsuviðurskiftini hjá fólki, sum starvast í ymiskum yrkisbólkum, verða ávirkað av teirra arbeiðsumstøðum. T.d. heilsuviðurskiftini hjá teimum sum arbeiða á fiskavirkjum - ella trolmonnum, línumonnum ella útróðrarmonnum — ella teimum sum arbeiða við asfalti – ella heimahjálparum – ella hjá teimum sum sita við telduknappaborðið dagin langan..

**Og vit hava arbeiðseftirlit, umhvørvislógir og áhugafelagsskapir...**
Vit hava í veruleikanum eina rúgvu av ymiskum stovnum og skipanum, sum alt átti at verið samskipaðir tættir í einum víðfevnandi fólkaheilsupolitikki, men sum tíverri bert virka allir hvør í sínum lagi, hvør fyri sínum serstaka endamálið. Umframt Fyribyrgingarráðið og Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu hava vit m.a.:

- Arbeiðseftirlitið, sum skal syrgja fyri at arbeiðsviðurskiftini eru trygg og góð, so sum ásett verður í eini rættiliga nýggjari arbeiðsumhvørvislóg.
- Heilsufrøðiliga Starvstovu, sum m.a. umsitur Matvørulóg og Umhvørvislóg – tættir av alstórum fyri fólkaheilsustøðuna.
- Og vit nógvar aktivar áhugafelagsskapir á heilsuøkinum, har sjálvboðin gera ómetaliga stórt arbeiði á ógviliga fjølbroyttum og ymiskum økjum, bæði sum hjálp og vegleiðing til raktar einstaklingar og sum alment upplýsandi fyribyrgingarvirksemi.

Og vit hava eisini ein hóp av øðrum felagsskapum, sum avgjørt eiga at hava ein stóran leiklut í einum virkandi fólkaheilsupolitikki, sum t.d. ítróttarfeløgini, bygdarfeløgini, ungmannafeløgini, frítíðarfeløgini, pensjonistafeløgini...

**Men tað vantar at samskipa tættirnar til ein virkandi fólkaheilsupolitikk**
Allir fortreytir eru sostatt longu til staðar fyri einum virkandi fólkaheilsupolitikki – uttan ein: tað er tann politiska. Her er uppgávan hjá løgtingi og landsstýri at gera eitt framtak, til tess at orða meginreglurnar til ein yvirorðnaðan fólkaheilsupolitikk. Og at fáa allar hesar stovnar, deildir, ráð og felagsskapir at samvirka fyri einum fólkaheilsupolitikki, sum røkkur út um alt samfelagið, til allar aldursbólkar, til allar yrkisbólkar, til allar borgarar í øllum teirra dagliga lívi og levnaði.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Ov nógvar svartar tekjur úti á bygd

**Frits Johannesen**



"Tað ber á grønt", var sagt í einum útvarpsleiki fyri nøkrum árum síðani. Nú bera flestu tekjur úti á bygd á svart. Svart er svart. Svart er tað, sum í listini ber tað við sær, at næstan einki er eftir, sum kann siga fólki, at hetta er ein málningur. Listamenn hava roynt at "minimera" málningin, og koma teir har til, at svart er tað síðsta tú m. a. kanst velja, áðrenn fóturin flytir seg í listaheimin, har einki er eftir. Tá flýgur listin út hagar, hvar bert ravnagorr hoyrist á stummari nátt.

Picasso málaði: Bláa atmosferu. Tað bláa er fragari enn svart. Blái dámurin fær teg uppfrá, og tú fert at sveima. Tú fert ikki inn í myndina, sum tá ið tú skoðar svarta flatu. Ingolvur av Reyni málaði eitt árið málningin, sum bar heitið: Gráur morgun. Grátt er hóast tað, sum liggur millum svart og hvítt, men hugsandi er, at Ingolvur vildi vísa á, hvussu langt tú kanst fara við listini, at bert grátt kann mynda ein málning; og tað er fragari enn svart.

Eg veit ikki, hví fólk velja svart tak, tá íð tey skifta tekju. Fleiri, sum seta føtur undir egið borð, velja eisini svarta tekju. Hvat líkist tað, at ung fólk velja tekju við svørtum liti? Ber hetta á tað borðið, at tað sær myrkt út úti í víðu verð, ella er tað so, at fullveldið spøkir í "undirbevístheitini," og ein ávísir ótti liggur sum grums á sálarbotninum fyri hesi søk? Eg sigi bara eitt: " Vit kunnu ikki taka fullveldið við tekjum, hvar stórsti parturin ber á svart!"

Tá ið eg siti uppi við Bøveg - Norðuri í Gerði í Fuglafirði og lítið út yvir bygdina, síggjast alt ov nógvar svartar tekjur. Tær reyðu, grønu, gulu og brúnu tekjurnar fækkast, og er hetta stórt spell. Tú verður drigin niður í hetta svarta holið, og ikki vendist aftur. Hetta er so tungt, døkt , dimt, dapurt og svart, at tað sigst ikki frá tí. Hetta er ikki bara galdandi fyri Fuglafjørð, men flestu bygdir okkara.. og Havnina við. Nei, kæru bý- og bygdafólk, tá ið tit skifta tekju, so vel ein lit, sum ikki ber á svart!!!!!!!!

# Kallsberg diktaturið

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Ímeðan samgongan tosar um frælsi, traðkar hon sjálv á mest grundleggjandi rættindini føroyinga. Nevniliga demokratiska rætt føroyinga at siga sína hugsan.

**Demokratiið hótt:**
Ein veljarakanning fyri og onnur eftir sína, at stórur meiriluti av føroyingum ikki tekur undir við loysingini - hóast ein meiriluti av teimum fólkavaldu í løgtinginum eru av aðrari hugsan. Júst hendan andsøgn átti at ført við sær, at politiski myndugleikin við eini/fleiri fólkaatkvøðum tryggjaði sær, at fólksins vilji var framdur.

Men hvat gera Annfinn Kallsberg og Høgni Hoydal. Teir avlýsa fólkaatkvøðuna um ríkisrættarligu viðurskiftini. Síðan spæla teir ein sjónleik fyri pressuni, har H. Hoydal tykist sera harmur um, at fólkið ikki sleppur at atkvøða. Men hann ynskti helst onga fólkaatkvøðu nakrantíð. Tí hon hevur ongan áhuga, tvørturímóti.

Tað tykist líkamikið fyri hann og samgonguna hvat føroyingar halda.

Teir tykjast halda, at føroyingar ein dag 4. hvørt ár eru atkvøðuneyt, og skatta og avgjaldsneyt restina av tíðini. Allar vanligar demokratiskar reglur tykjast settar úr gildi.

Fólk áttu at verið eftirspurd á eini fólkaatkvøðu um loysingina. Ella tær stóru skerjingar og yvirtøkur, sum samgongan ófyrireika og við stuttum skotbrái setir í verk júst nú.

Eisini hevði t.d. verið rímiligt, at kirkjufólkið varð eftirspurt, um kirkjan skuldi yvirtakast. Kirkjan er nevniliga ein fólkakirkja. Tað er stór skomm at fólkakirkjan nú verður gjørd til ein brikk í fullveldis stríðnum. Tað hevur hon ikki uppiborið. Og tað hoyrir ongarstaðir heima.

Vit eiga í fólkaræðisligum demokratiskum anda at fremja politikk her á landi. Og spyrja kirkjufólkið, hvat teirra hugsan er um hesi viðurskiftir. Um tey ynskja, at kirkjan skal yvirtakast, so eigur politiski myndugleikin at fylgja hesum ynski, og arbeiði eigur at verða gjørt til fulnar. Um fólkið sigur nei, so eigur politiski myndugleikin at fylgja hesi niðurstøðu eisini. Uttan mun til, hvør samgonga er í Tinganesi.

**Kallsberg diktaturið:**

- Men diktatorarnir í landsstýrinum (eg veit ikki um Kallsberg stýrir Hoydal ella umvent, ella um báðir verða fjarstýrdir úr London) eru líka glaðir um 100 % av kirkjufólkinum eru fyri ella ímóti.
- Um 100 % av føroyingum eru ímóti øllum teirra ætlanum. Teir yvirtaka í einaræðisligum anda.
- Løgreglan skal yvirtakast, sjálvt um tað ikki ber til eftir heimastýrislógini. Tað eru teir líkaglaðir við.
- Ríkisveitingin skal skerjast, sjálvt um flest allir føroyingar eru ímóti.
- Vælferðin hjá føroyinginum skal skerjast, hóast allir føroyingar eru ímóti.
- Vælferðin hjá Landstýrismonnum og politikkarum skal økjast, sjálvt um allir føroyingar eru harðliga ímóti hesum.
- Onki røktarheimspláss er komið hetta samgonguskeiðið, sjálvt um allir føroyingar vilja tað.
- Eiga vit ikki at steðga á og spyrja hvat hendir í samfelagi okkara ídag?
- Eiga vit ikki at hava sum minsta mál, at Føroyar í framtíðini gerast eitt demokratiskt land. Væl hava vit í dag eitt demokratiskt val 4. hvørt ár. Men seinasta skeið vísir okkum, at ramasta diktatur kann fremjast ímillum hesi valini.
- Tí eigur tað at standa í eini komandi ríkisavtalu, hvussu mannagongdir skulu vera, fyri at tryggja demokratiska framferð, tá ið t.d.stórar og minni stórar ríkisrættarligar umskipanir skulu gerast. Hvørji mál skulu til eina fólkaatkvøðu, og hvørji ikki skulu. Ella um øll slík mál skulu til eina ella fleiri atkvøður. Um talan skal vera um einfaldan ella kvalificeraðan meiriluta. o.s.v. Fyri at tryggja at fólkaviljin var framdur.
- Eg eri stórliga bangin fyri, at um løgreglan varð yvirtikin, so var stutt tíð, til loyniløgreglan bankaði á dyrnar hjá andstøðingum... Og helst høvdu fleiri fongsul verið at sæð. Sjálvt um føroyingar vóru ímóti hesum.
- Vit, tjóðskaparhugaðu Sambandsfólk, vilja hava eina nýggja skipan innan ríkisfelagsskapin. Eina skipan, har demokrati og frælsi stimbra virkisfýsni á øllum økjum.
- Har eitt orð er eitt orð.
- Og skattalætti er skattalætti.

# Fyrispurningur um uttanríkispolitikk

**Tíðindaskriv**
*Sambandsflokkurin*

**Undanfarna landsstýri legði stóran dent á at fáa handilssáttmálar í lag við Eysturevropeisku londini. Hetta var gjørt, tí at landsstýrið metti, at hesi lond seinni fóru at gerast partur av ES, og at tað tí var sera týdningarmikið at gera handilssáttmálar við hesi lond, áðrenn tað hendi. Men síðani núverandi landsstýrið tók við, er einki hent á tí økinum. Ístaðin hevur landsstýrið nýtt alla sína orku til at greiða frá, hvat vit ikki kunnu. Tí hevur Edmund Joensen, løgtingsmaður sett Anfinni Kallsberg, løgmanni ein fyrispurning um hetta.**

Undanfarna landsstýri hevði samráðingar um handilssáttmála við bæði Estland og Póland, og hesar samráðingar førdu við sær, at vit fingu sáttmálar við bæði londini. Við hesum sáttmálum vildi táverandi landsstýri tryggja, at vit fingu eina betri støðu bæði mótvegis londunum sjálvum, og eisini seinni mótvegis ES.

**Nýggja landsstýrið helt fram**
Tá núverandi landsstýri tók við, sá út til, at henda gongdin fór at halda fram. Í frágreiðing løgmans um uttanlandsmál í 1999 varð sagt, at samráðingar um handilssáttmálar vóru í gongd ella um at fara í gongd við Lettland, Litava, Rumenia, Bulgaria, PLO, Kroatia, Turkaland, Russland, Kanada, Kili, Brasilia, Meksiko og Marokko.

Seinni hevur løgmaður greitt uttanlandsnevndini frá, at ætlanin var eisini at gera fríhandilssáttmálar við mong onnur lond uttan fyri Evropa.

Í løgmansrøðuni á ólavsøku í fjør varð sagt, at samráðingarnar við Russland og Lettland um sínámillum fríhandilssáttmálar vóru um at vera loknar. Sagt varð eisini: *"sáttmálin við Russland verður væntandi ein fullkomin fríhandilssáttmáli við ongum avmarkingum fyri vøruhandil."*

**Komu til Føroya**
Seint á sumri í fjør hoyrdist í føroysku fjølmiðlunum, at russar vóru komnir til Føroya, at undirskriva sáttmálan, og at Føroyar sostatt vórðu fyrsta landið í heiminum, sum gjørdi fríhandilssáttmála við Russland. Seinni hoyrdist tó, at russisku umboðini vóru farin avstað aftur, uttan at sáttmálin var undirskrivaður.

**Ólavsøkurøða løgmans gav onga frágreiðing**
Í ólavsøkurøðuni í ár segði løgmaður soleiðis: *"Í heyst verður sáttmáli undirskrivaður millum Føroyar og Russland um handilsligt og búskaparligt samstarv. Tá hesin sáttmálin er komin í gildi, verða samráðingarnar um ein veruligan fríhandilssáttmála millum londini tiknar upp aftur"*

Hvat ið vorið er av øllum hinum samráðingunum, sum vóru í gongd ella um at fara í gongd í 1999, verður einki nevnt um í løgmansrøðuni. Heldur ikki hevur nakað verið upplýst um, hvat er hent við tí partinum av sáttmálanum við Russland, sum var klárur at skriva undir seinasta summar, men sum nú verður tikin upp aftur.

Edmund Joensen, løgtingsmaður hevur tí í tinginum, sett fram fyrispurning, har hann vil hava løgmann at greiða frá, hvussu langt landsstýrið er komið við arbeiðinum, sum undanfarna landsstýri setti út í kortið.

# Kaos um Vestmannasund og Leirvíksfjørð

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*

Landstýrimaðurin í Vinnumálum røkir ikki sína uppgávu til fulnar, tá SAM einsamallur skal røkja farleiðina í fleiri vikur.

Seinastu vikurnar hevur javnan verið kaos um Vestmannasund, nú Ternan er á sleipistøð. Hóast manningin eigur alt rós uppiborið fyri valaarbeiði, kemst ikki uttanum, at SAM er so lítið skip, at tað ikki kann nøkta tørvin um Vestmannasund. Tað ger, at bíðitíðirnar eru ótolandi hjá bæði privat og last bilum. Bíðitíðirnar eru ofta 3-4 tímar fyri at sigla hesar 20 minuttirnar. Tað kostar bæði vinnu og privatum nógv.

Eg vóni, at tað er seinastu ferð, at SAM einsamallur verður settur at sigla hesa farleið. Tað er neyðugt, at eykaskip verður fingið til vega, tá ið Ternan er á sleipistøð ella líknandi.

Tað skilst, at sama óskil er dagligur kostur hjá teimum, ið ferðast um Leirvíksfjørð.

Álvaratos, eru vit komnir úr kreppuni og hava eitt yvirskot uppá 600 milliónir krónur árliga? Mong høvdu kunna liva við einum minni yvirskoti og betri siglingarumstøðum um Vestmannasund og Leirvíksfjørð. Vit kunnu so ikki liva við hesi vána støðu longur. Tað er gott at tunnilin kemur um Vestmannasund. Somuleiðis verður gott, tá tunnilin kemur um Leirvíksfjørð. Men vit skulu liva til tær koma.